FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 22. juni 2020
J. nr.: 20/00299
Viðgjørt: MM/EC

Svar upp á fyrispurning nr. 102/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um trygd og tilbúgving í Vága Floghavn

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu fara uppsagnirnar av starvsfólkum í Vága Floghavn at ávirka trygdina og tilbúgvingina ?
2. Er ætlanin at seta størvini aftur, nú flogferðslan økist aftur?

Svar:
Orsakað av COVID-19 smittuni varð stórtsæð øll millumlanda flúgving steðgað í mars 2020. Sum avleiðing av ikomnu kreppuni varð grundarlagið fullkomiliga tikið undan inntøkunum hjá P/F Vága Floghavn. Felagið segði tískil í mai 2020 umleið 20 fólk úr starvi. Hetta fyri at tryggja fíggjarliga grundarlagið hjá floghavnini.

Vága Floghavn hevur neyðugu manningina til at lúka øll myndugleikaásett krøv um trygd og tilbúgving, eisini eftir uppsagnirnar. Uppsagnirnar ávirka tí ikki trygd ella tilbúgving.

Vága Floghavn hevur mett um flogferðsluna fram til árslok 2021. Metingarnar byggja m.a. á samskifti við tey flogfeløg, sum brúka Vága Floghavn, og á altjóða metingar av flogferðsluni komandi árini. Út frá metingunum hevur floghavnin mannað seg til tann miðaltørv, sum kann væntast tað næsta hálvt-annað árið.

Tørvurin á manning verður støðugt lagaður til flogferðsluna ymsu árstíðirnar. Men hóast ferðslan nú spakuliga veksur aftur komandi summarmánaðirnar, hevur tað ikki við sær tørv á fleiri starvsfólkum fyribils. Vanligt er, at flogferðslan er størri í juni til august enn restina av árinum. Soleiðis verður eisini í ár, men havast skal í huga, at talið av flogførum verður munandi lægri enn somu tíð undanfarnu árini. Afturgongdin í ferðafólkatalinum verður mett til eini 60-70% í mun til 2019.

Í løtuni er óvist, nær flogferðslan kann væntast at koma uppá støðið, sum líkist tí í undanfarnum árum. Tað ber tí ikki til at siga, um og nær størv verða sett aftur.

Tinganes, 22. juni 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum